# Kjak



Kári P. Højgaard
*løghtingsmaður*

## Hóast løgreglan er donsk má hon virka sum partur av føroyska samfelagnum

Ferð eftir ferð síggja vit dømi um, at løgreglan í Føroyum verður stýrd uttan fyrilit, hvat føroyskir myndugleikar ynskja og vilja. Seinasta dømi er niðurleggingin av vaktarhaldinum á løgreglustøðini í Runavík, sum er framd uttan at føroyskir myndugleikar yvirhøvur eru tiknir við uppá ráð.

Landsstýriskvinnan í Innlendismálum Annika Olsen hevur í skrivi dagfest 12. november í ár til danska løgmálaráðharran Lars Barfod, biðið um eina frágreiðing í samband við umleggingar og broytingar innan løgregluna í Føroyum, men enn hevur hon einki svar fingið.

Landsstýriskvinnan hevur mótvegis avvarðandi donskum myndugleikum gjørt greitt, at hon fegin vil kunnast og hoyrast um slíkar umleggingar, áðrenn hesar verða settar í verk. Kortini verða broytingar støðugt framdar viðvíkjandi løgregluni uttanum politiska myndugleikan, sum er valdur av Føroya fólki til at stýra og hava ábyrgd.

Eisini lokali politiski myndugleikin hevur sett stórt spurnartekin við avgerðina. Borgarstjórin í Runavík vísti í grein á ótryggleikan ið stendst av, at vaktarhaldi á politistøðini er niðurlagt, og politistaliði í Eysturoy er burturflutt úr nærumhvørvinum.

Eg havi 20. oktober 2010 sett Ríkisumboðnum Dan M. Knudsen spurningin, hví vaktarhaldið á løgreglustøðini í Runavík verður niðurlagt og teir 9 politistarnir fluttir til Klaksvíkar, men hóast nærum tveir mánaðar eru gingnir, havi eg enn einki svar fingið.

Løgreglan er eftir heimastýrislógini felagsmál. Hetta eigur tó ikki at merkja, at løgreglan í Føroyum er donsk. Løgreglan í Føroyum skal vera føroysk, og hon skal virka sum ein samrunnin partur av føroyska samfelagnum, og ikki sum ein tilvildarlig grein av einum donskum stovni í Danmark.

Tað tykist, sum leiðslan fyri løgregluni í Føroyum hevur lítlan hug til at taka tey atlit, sum høvdu verið náttúrlig at tikið, tá løgreglan í Føroyum skal skipast. Kanska halda tey tað vera meira náttúrligt at taka atlit, sum kanska síggja gott út í hagtølum og talvum niðri í Danmark.

Við verandi gongd er spurningurin viðkomandi, um vit ikki nærkast einum vegamóti, har avgerð má takast, um løgreglan í Føroyum skal vera donsk og arbeiða í samsvari við donsk harraboð, uttan virðing fyri føroyskum myndugleikum, ella um vit vilja hava eina føroyska løgreglu undir føroyskum málsræði?

---



Kitty May Ellefsen

## ALS skipanin er bíbilsk

*ALS skipanin er ikki nóg góð fyri tey 800 fólkini, sum hava mist arbeiðið hjá Faroe Seafood. Skipanin er bíbilsk – Tey ið forvunnu mest fáa mest og tey sum hava forvunnið lítið fáa enn og minni. Eftirsum at lítið arbeiði hevur verið seinastu tíðina á Faroe Seafood mugu fleiri av hesum fólkum liva á fátakramarkinum – eisini á jólum*

Fyrr í vikuni hoyrdu vit høgtstandandi politikkarar siga, at teir ikki blandaðu seg í trupulleikarnar hjá Faroe Seafood. Um virkið fer á heysin so var tað eingin stórvegis trupulleiki tí fólkini vórðu øll loftað av ALS skipanini.

### Svár neyð undir ALS

Hjá alment og fast løntum fólkum er ALS skipanin óivað góð. Men hjá teimum 800 fólkunum, sum vórðu uppsøgd á Faroe Seafood fríggjadagin er hon alt annað enn nøktandi.

Trupulleikin hjá hesum fólkum er útrokningargrundarlagið, sum er staðfest í § 15 í lógini. Útrokningargrundarlagið er móttikna A-inntøkan seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn arbeiðsloysi er staðfest.

Seinasta árið hjá Faroe Seafood hevur verið vánaligt og á fleiri virkjum hevur einast verið arbeitt eini tveir dagar um vikuna. Hetta ger at arbeiðsfólki longu er hart kroyst økonomiskt og ALS-skipanin ger teirra støðu enn og verri nú tey skulu liva fyri væl minni.

### Vinnumálaráðið má saman við stýrinum fyri ALS broyta útrokningargrundarlagið fyri hesi fólk í eitt tíðarskeið

Vit kunnu ikki liva við, at ein so stórur partur av føroya fólki livur á hungursmarkinum. Tí eigur ALS stýrið, at heita á Vinnumálaráðið, at virka fyri at lógin verður broytt soleiðis, at útrokningargrundarlagið í § 15 verður broytt soleiðis at hesi fólkini fáa eitt virðiligt útgjald, sum sømur seg fyri eitt framkomi samfelag.

Minnist til! Hetta eru fólkini ið arbeiða í útflutningsvinnuni. Vinnuni ið er grundarsteinurin undir vælferðarsamfelagnum. Vit hava skyldu at løna teimum betur.

---



Edva Jacobsen
*løgtingslimur fyri Sambandsflokkin*

## Ábyrgdarleysur loysingarpolitikkur kostar vælferð

Millum annað Tjóðveldi og Miðflokkurin arbeiða fyri at minka inntøkusíðuna hjá landskassanum við at lækka blokkin. Hesir flokkar hava í 2001 verið við til at yvirtaka skúlamál og forsorg, sum viðførdi at ríkisveitingin minkaði við 366 mió. Somu flokkar ætlaðu í CHE samgonguni at yvirtaka serforsorg, sum hevði gjørt, at blokkurin hevði lækkað við 117 mió afturat. Hettar bleiv tíanbetur steðgað av ABC samgonguni, sum tók um endan.

### Stórt politiskt ábyrgdarloysi

Allur hesin niðurskurður er gjørdur í óðum verkum, uttan búskaparligt fyrilit, og **helst skuldi allur blokkurin verið burtur í gjár heldur enn í morgin.**

Í Miðflokkinum verður sagt, at blokkurin er eitt haft um beinini hjá fólkinum, sum her býr, og at vit mugu "koma burtur úr hesari veiting", sum um tað var nakað ræðuligt.

Tá samanborið verður við eitt haft, so er tað tí, at føroyingar mugu burtur úr blokkinum skjótast til ber.

Í Tjóðveldi verður hesin sami blokkur nevndur " ein eitur innspræning" .

Hendan innspræning verður nýtt til at taka lívið av fólki, so tað er ein sera óhugnalig samanbering. Tað sigur bara nakað um, hvussu ábyrgdarleysur politikkurin er.

### Ábyrgdarloysi kostar vælferð

Hvørt mansbarn skilur, at slíkt politiskt ábyrgdarloysi ger, at tað eru færri inntøkur til landskassan. Hetta ger sjálvsagt, at landið hevur minni pening at gera gott við til tænastur, sum verða veittar av tí almenna. T.v.s at tað rakar øll, sum millum annað Miðflokkurin vanliga sigur seg hava so stóra umsorgan fyri. Orð og gerðir passa bara ikki saman í hesum førum.

**Tá ríksiveitingin er burtur, hvat so? Hava hesi flokkar nakað at seta í staðin fíggjarliga?**